# Eyðun Hestakorn

## Valdið og listin III.

### Greinarøð



Hanus Kamban

Eitt morgunbros, frá eini ungmoy - við andliti sum minnir um nýsprotna baldursbrá - tað er heilsan, Noreg gevur okkum, tá vit koma upp um níggjutíðina ein morgun í miðjum juli, á veg inn eftir Bergensfjørðinum umborð á einum av skipunum hjá Color Line. Sólin bræðir tað seinasta morgunsirmið burtur, fura og grann fetta sær rankar á á nesjum, heyggjum og skergarðsoyggjum, bátar liggja uppdrignir undir húsum og neystum, sethúsini, mong teirra við svalum oman móti bláum víkum og sólgyltum lundum, líkjast slottum, og verksmiðjur, kirkjur og brúgvar, hongdar upp ørandi millum tindar og berg, bera boð um bjartskygni og trúgv á framtíðina. Víst er hon verd at heilsa uppá, henda frúgvin, við (hugsi eg) skjótt 2.000 oljumilliardum á bundnari kontu!



*Hákunarhøllin, bygd liðug í 1261*

### Bergen og Havnin

At koma til Bergen er næstan sum at koma heim. Tað var Jørgen-Frantz Jacobsen, sum, við tí fyndugu elegansu, sum var honum so lík, helt fyri, at Havnin í grundini bara var ein minni útgáva av Bergen, tí her í Bergen eru, sum í okkara lítla høvuðsstaði, tvær vágir, og sum Bergen hevur sítt Norðnes, hevur Havnin sítt Tinganes. Taka vit nú søguna og bókmentirnar uppí, so er at kalla hvør blettur í Bergen heimakunnugur, Hákunarhøllin, Mariukirkja, Bryggjan og ikki minst Hansa-fornminnissavnið, sum fyrst og fremst vinmaður Hans Andriasar, Christian Koren Wiberg, listamálari, arkitektur og fornfrøðingur, legði nógv arbeiði í at byggja út og gera til eitt virðiligt savn.

Eg fari við lunnabreytini niðan á fjallið Fløyen, 300 metrar uppi yvir býnum, har ferðafólk kunnu keypa sær postkort ella njóta eina máltíð í matstovuni, og aftur sendir býurin mær eitt bros, hesar ferð fjarari og meira romantiskt, sáldað gjøgnum dreymatár, farandi og komandi, av mjørka og sirmi.

Eins andaliga viðføri fargar tað upplivaða, og nú síggi eg Sigmund í Hoyvík sála, skipandi *Margretu kvæði*, tá dansurin gongur av tí besta. Dulvitskan hevur rakt snórabeint, tí í einki annað verk enn hetta er býurin Bergen ristur so týðiliga, sjóvarmáli, kongsborg, myrkastova, Mariukirkja, Norðnes og, fyrst og fremst, tann politiska støðan sum hon var í Noregi um ár 1300, tá ið kuggar úr Lübeck førdu vín henda vegin og fóru avstað aftur fullfermdir við turrum fiski, og tá ið Bergen var størsti havnar- og handilsbýur í Norðuratlantshavi og Noregs kongsbýur og høvuðsstaður.

### Margretu kvæði

Eirikur Magnusson, kongur í Noregi, ger av at senda sína ungu dóttur til fremmand lond at verða "moykongur". Eyðun Hestakorn og Ingibjørg, sum eru fylgisneytar hjá gentuni, gera av at selja hana sum træl til Blálanda, t.e. Afrika. Greivin av Blálondum keypir hana, men tá hann frættir, at hon er "av kongakyni", ger hann av at gifta seg við henni. Tey liva saman og fáa ein son, men so eina náttina droymir Margreta ein løgnan dreym:

*Meg droymdi, í Norðnesi*
*har var vaksin viður,*
*hjørturin við sítt fagra horn,*
*hann spældi for bergið niður.*

Greivin ræður dreymin og sigur, at hetta merkir, at Margreta kemur heim og verður brend. Margreta fer, sum drigin av lagnuni, heim aftur til Noregs. Faðir hennara er deyður, og bróðirin Hákun er nú kongur í Noregi. Hon sigur, hvør hon er, tvey vitnir vátta tað hon sigur, men Eyðun Hestakorn ber so í bandi, at annað vitnið, fostra hennara Ása Tistilsfrú, gongur frá sínum orðum, og úrslitið er, at Margreta verður fongslað og seinni brend á Norðnesi. Eyðun fýrir hana sjálvur øvuga av hesti út á bálið. Barnið, hon hevur átt í myrkastovu, klývur hann sundur "í lutir tvá", og síðani "kastar" hann eisini tað "út á bál". Eisini meistarin Eingilbrekt, sum er álitið hjá Margretu, verður av Eyðuni dripin og blakaður á bálið.

Eyðun Hestakorn er soleiðis frá byrjan til enda meistari fyri vanlagnuni hjá Margretu. Og ikki bara tað, hann er sum heild tann stóri svíkjarin í okkara bókmentum og kann samanlíknast við eitt nú Gýðin jall, Ásmund Kellingarson og Kálv Lítla. Vísan leggur, tá hon skal lýsa, hvat hetta illmenni troystar sær at gera, ikki fingrarnar ímillum:

*Tóku tey frúnna Katrina*
*løgdu undir høgindi blá,*
*Eyðun og frúgvin Ingibjørg*
*tey settust omaná.*

### Hvør var Eyðun Hestakorn?

Men hvør var Eyðun Hestakorn? Svarið er: Hann er søguligur persónur og var ein tann mest týðandi maðurin í norskum politikki í seinnu helvt av 13. øld. Hann æt Audun Hugleiksson, varð føddur um 1240 og átti tilkomin nógva jørð í Norðfjørði og Suðurfjørði. Á Hegranesi í Jølster átti hann setursgarð, og har bygdi hann borg úr gróti, sum sambært útgrevstrum var 21-22 metrar long og 12-13 metrar breið. Umframt Álv Erlingsson var Audun Hugleiksson einasti maður í Noregi, tá ið kongur sjálvur er undantikin, ið átti slíka borg.

Eyknevnið Hestakorn kom antin av tí, at Audun var so ríkur, at hann gav sínum rossum havra at eta, ella av *hestakorni*, einum serligum slag av skatti, sum bøndur um Oslo-leiðina máttu rinda til skansan Akershus.

Á døgum Audun Hugleikssonar høvdu tveir kongar av Sverraættini valdið í Noregi, Hákun Hákunarson (1204-63) og sonur hansara Magnus Lógbøtari (1238-80). Eirikur kongur rópti Audun "sín frænda", helst tí at Inga, mamma Hákun Hákunarson, og Audun í Borg, abbi Audun Hugleikssonar í kvennlegg, vóru skyld. Hákun og Magnus

Sosialurin